DAGSINS MEINING

Skálafjarðarsiglingin og landsplanlegging

Tað er ikki tí vit ikki unna eysturoyingum, sum arbeiða í Havn, gott ferðasamband - men er tað ikki misbrúk av samfelagsligum skattapengum at halda eina rutu gangandi, sum hevur so stórt undirskot, sum blaðið vísti á í gjár – 11.000 kr. í halli um dagin!

Oftani er torført at fáa eitt sakligt og siðiligt tjak um stórar og smáar samfelagsspurningar uttan at tað verður kastað eftir hvørjum øðrum fyri at vera lokalpatriotar henda alla handa vegin. Sjálvandi vil so vera í einum lítlum samfelag sum okkara, at hvør vil fjálga og verja um sítt pláss. Men vit mugu eisini vera realistisk og innsíggja veruleikan, sum hann er. Hvussu nógvar milliónir eru ikki farnar í vega- og tunnilsgerð millum t.d. Havnina og syðstu plássini kring Skálafjørðin! Hetta eru samfelagsligar iløgur, hetta er skattborgarans peningur, ið er brúktur til at betra um møguleikarnar hjá serstakliga fólki kring Skálafjørðin at koma skjótari og lættari til arbeiðis og øðrum ørindum í høvuðsstaðnum. Um somu tíð er ferðafólkaflutningurin yvir land eisini nógv betraður.

Hóast hesar sannroyndir, so krevja ávísir politikarar í Eysturoynni at hava eina sjóvegis rutu eisini, sum teir vita gevur og fer at geva hall so langt vit kunnu síggja inn í framtíðina. Og út frá síni máttmiklu støðu sum partar av samgonguni fáa teir sín vilja. Tað er í slíkum føri, at vit hava brúk fyri landsplanlegging. Og politikarum, sum duga at skilja týdningin av hesum so týðandi orði. Nevniliga har tú fyrst ger íløgur fyri at betra um samferðsluviðurskiftini og harvið sleppur undan dupultfunktiónum, sum geva ett drønandi hall. Skálafjarðarsiglingin er eitt himmalrópandi dømi um eina slíka dupultfunktión.

Skjótt fáa vit at síggja, um henda siglingin skal gerast ein uppaftur størri kleppur um beinini á skattborgarunum, tí tá skal avgerð takast um skipið, sum skal sigla á leiðini. Verandi skip er uppslitið og skulu nógvar mill. játtast av løgtinginum til antin umvæling av verandi skipi, leigu av øðrum ella nýgerð. Skálafjarðarsiglingin er besta dømi um, at politikarnir mugu til at taka landsplanlegging í álvara. At tú øðrumegin gera stórar iløgur í samferðsluviðurskiftini á landi ber í sær, at tú harvið sleppur undan dýrum íløgum og rakstri á sjónum. Tú tilrættaleggur viðurskiftini soleiðis, at tú sleppur undan dupultfunktiónum.

Samtíðis sum tað er eitt ynski hjá fleiri politikarum og flokkum at minka um tilskotið vit fáa úr Danmark, so er greitt, at vit ikki samtíðis hava ráð til dýrar dupultfunktiónir, hvørki hvat íløgum ella rakstri viðvíkur. Har landfast er í Føroyum eigur ikki at verða neyðugt við eisini at hava dýrar undirskotsgevandi rutur sjóvegis.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Formaður í 30 ár

Januar í ár hevði Óli Jacobsen sitið í 30 ár sum valdur formaður fyri fiskimenninar í Føroyum. Slíkt álit er fáum beskorið. Óli hevur ikki verið formaður í samfull 30 ár, tí hann royndi seg í Tinganesi sum landstýrismaður í ringastu kreppuárum føroyinga í nýggjari tíð. Hann sæt hálvt annað ár í Tinganesi, og tá er ikki loyvt at hava annað starv við síðuna av.

Men hetta er ikki einasta álitisstarv Óli hevur havt. Fyrsta august í fjør hevði hann sitið í samfull 20 ár sum formaður fyri fiskivinnudeildini hjá altjóða flutningsfelagsskapinum ITF.

Og í ár eru tað 35 ár síðani Óli fyri fyrstu ferð varð valdur í nevndina á Føroya Fiskimannafelag. Óli er 57 ára gamal. Ein onnur rekord, sum ikki er serliga høg er viðvíkjandi hjúnarbandinum. Óli giftist seint og hann plagar at býta lívið sundur plagar at taka til: »Tá ið eg var gamal drongur og so nú.«

Tíðin í ITF hevur gjørt Óla til ein rættan heimsborgara. Tað er ikki tann heimspartur, sum hann ikki hevur sitið og fundast á. Óli er á ársfundi hjá ITF á hvørjum ári og sjálvur hitti eg hann í Singapore fyri nøkrum árum síðan.

»Við hvørt kenni eg meg máttleysan í sessinum, kanska havi eg sitið ov leingi, men so komið eg fyri meg aftur. Eitt gott er við at hava verið so leingi í saman starvi, eg havi nógvar royndir at byggja á. Eg havi starvast undir 10 fiskimálaráðharrum, harav hava tveir sitið í tvey skeið. Løgmaður Anfinn Kallsberg og Johan Petersen.«

Óli er ein samfelagsvirkin maður. Hann fylgir sera væl við hvat hendir í samfelagnum og hevði tíðin hann hevur sitið á løgtingsins áhoyraraplássum og lurta verið tikin við í tingtíð hansara, so hevði fáur tingmaður tikið hann í tímum í løgtinginum.

Fisikmenninir dáma væl Óla, tað mugu teir gera, tí teir velja hann umaftur og umaftur, trý ár í senn og enn røkist einki fyri, at Óli ætlar at leggja frá sær sum formaður hjá okkara fiskimonnum. Onkuntíð er komið fyri at onkur hevur stilla upp móti honum, men hesin hevur fingið lítla undirtøku.

je

Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri bróðir okkara

Edil í Geil

andaðist og varð jarðaður, takka vit hjartaliga.

Systkini

Bergur Hansen, djóralækni

Jóhanna á Tjaldrafløtti, fødslu/húsarhaldsfrøðingur

Heri Krageesteen, sálarfrøðingur

Ingi Højgaard, løgfrøðingur

Jens Andreassen, lækni

Heri Joensen, prestur

Jón Klein Olsen, politistur

Jón Krageesteen. Ferðslutrygd

Julianna Næs, pedagogur

Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi

Turid Thomsen, lestrarveglei ðari

Marius Staksberg, málfrøðingur

Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,
Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

Svarini verða prentað í blaðnum mikudag

Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,
Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

Svarini verða prentað í blaðnum mikudag

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Mentan:
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Bara ein hernaðarmyndugleiki í Føroyum

Nú verður alt danskt hernaðarvirksemi í Føroyum savnað á einum stað. Flyvestation Torshavn í Mjørkadali og Færøernes Kommando við Hoyvíksvegin eru løgd saman til eina stað, sum kallast Færøernes Kommando, og hon fer at halda til í Mjørkadali

SAMANLEGGING
Stefan í Skorini

Nýggi og einasti leiðarin av donsku herstøðini í Føroyum, Jesper Dinesen, sigur, at uppgávurnar hjá danska hervaldinu í Føroyum framvegis eru tær somu
Mynd Jens Kr. Vang

Hósmorgunin var samkoma í bygninginum hjá danska hervaldinum í Mjørkadali. Har var Jesper Helsø, generalloytnantur og ovasti í donsku verjuni, til staðar. Hann lat Jesper Dinesen leiðsluna av nýggju støðini.

Jesper Helsø bað fyrst Jesper Dinesen, fyrrverandi leiðara av Færøernes Kommando við Hoyvíksvegin, um at reisa seg og kunngjørdi, at Jesper Dinesen hervið ikki longur hevði leiðsluna av hesi støðini.

Síðani varð Erik Præstegaard, fyrrverandi leiðari av Flyvastation Torshavn, biðin um at reisa seg, og hann fekk boð um, at hann ikki longur er leiðari av støðini í Mjørkadali.

Síðani varð Jesper Dinesen alment settur sum leiðari av nýggja danska myndugleikanum í Føroyum, Færøernes Kommando í Mjørkadali, meðan Erik Præstegaard verður stabschef ella starvsfólkaleiðari.

Leingi hevur verið greitt, at henda samanleggingin skuldi vera, men nú er samanleggingin endiliga farin fram, og eftir er bara ein danskur hernaðarmyndugleiki í Føroyum.

Færri fólk

Hóast tað alment er boðað frá eini samanlegging, so verður sjálv samanleggingin ikki framd fyrr enn um hálvtannað ár. Ætlanin er, at hølini við Hoyvíksvegin standa tóm á sumri í 2002.

Áðrenn alt virksemið verður flutt niðan í Mjørkadal, so skal bygningurin umbyggjast, so hann kann hýsa øllum tí nýggja fólkinum. Handverkararnir fara í gongd við arbeiðið 1. mai í ár og verða væntandi lidnir 1. apríl 2002, og tá ber til hjá teimum við Hoyvíksvegin at flyta niðan.

Beint nú eru 107 fólk knýtt at teimum báðum støðunum, men tá samanleggingin er framd, verða bara 80 fólk á støðini. Av hesum eru eini tíggju sivil.

Jesper Dinesen sigur, at talan er ikki um nakrar uppsagnir, men bara um at flyta nøkur fólk niðuraftur til Danmarkar.

Talið av fólki, sum starvast í danska herinum, er nógv minkað seinnu árini, tí miðskeiðis í 60-unum vóru fleiri enn 200 fólk knýtt at danska hervaldinum í Føroyum. Tá var heimsstøðan eisini ein heilt onnur, og tað kravdi fleiri fólk á staðnum.

Ongar aðrar broytingar

Nýggi leiðarin fyri Færøernes Kommando, Jesper Dinesen, sigur, at uppgávan hjá herinum í Føroyum verður júst tann sama sum frammanundan samanleggingin.

– Okkara uppgáva er fyrst og fremst at hava fyri eini MRCC-støð, sum syrgir fyri bjarging á sjónum. Henda uppgáva er ikki broytt við hesi samanleggingini, men verður bara broytt um politiski myndugleikin krevur eina broyting á hesum økinum, sigur Jesper Dinesen.

Jesper Dinesen sigur eisini, at teirra møguleikar fyri at loysa hesar uppgávur ikki eru skerdir, men at teir eru eins væl førir fyri hesum sum frammanundan.

Samanleggingin er ein liður í "forsvarsforliget 2000-2004", sum bar í sær, at nakrar bygnaðarbroytingar vórðu framdar. Endamálið er, at sleppa undan at hava yvirskot av fólki í Føroyum.

Jesper Dinesen sigur eisini, at hesar rationaliseringar geva teimum møguleika at gera fleiri íløgur í Føroyum, um tørvur verður á tí.

Teir tríggir høvuðspersónarnir á samkomuni í Mjørkadali hósmorgunin. Frá vinstru er Erik Præstegaard, Jesper Helsø og Jesper Dinesen
Jens Kr. Vang

Alternativið í tilbúgvingini er Marinustøðin

Færøernes Kommando hevði kunnað verið klár við eini tilbúgvingætlan í sambandi við oljuvinnuna eftir nøkrum vikum. Hetta kann vera eitt gott alternativ, um samgongan ikki tekur undir við loysnini hjá Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni, sum umsitur tilbúgvingina

TILBÚGVING
Stefan í Skorini

Áðrenn oljuvinnan fer av bakkastokki, er alneyðugt at føroysku myndugleikarnir eru tilreiðar við eini tilbúgvingarætlan. Hetta skuldi vera avrátt á samgongufundi fyrr í dag, men úrslitið av hesum fundi var okkum ikki greitt áðrenn evstamark.

Jørgen Niclasen segði við Sosialin í gjár, at um hansara loysn ikki vann frama í samgonguni, so fór hann at royna aðrar loysnir beinanvegin, tí hann vil undir ongum umstøðum hava, at oljuboringin verður útsett við einum ári. Tað verður úrslitið, um ein tilbúgvingarætlan ikki verður klár fyri 1. apríl í ár.

Jørgen Niclasen leggur upp til, at Telegrafstøðin verður keypt, og har verður tilbúgvingin samskipað. Hon skal vera kunna at taka sær av vanlukkum, sum kunnu standast í oljuvinnuni. Óvist er, at um henda ætlanin fær undirtøku í samgonguni.

Jesper Dinesen, leiðari á Fæøernes Kommando, sum umsitur MRCC-støðina í løtuni, metir, talan er um nakrar vikur, áðrenn teir kunnu vera klárir við eini slíkari tilbúgvingarskipan, sum tørvur er á til oljuvinnuna.

Hann leggur tó áherðslu á, at hann við hesum ikki leggur seg úti kjakið um, hvussu tilbúgvingin skal skipast í Føroyum. Hann sigur eisini, at teir skulu hava boð frá myndugleikunum í Danmark, um teir skulu fremja hetta í verki.

Tørvur verður á betri útgerð, um Færøernes Kommando eisini skal hava tilbúgving í oljuvinnuni um hendi, men um boð eru eftir teimum, so hevði tað bara tikið teimum nakrar vikur, til tað hevði verið klárt.

Sitandi samgonga er tó einki fyri at lata danir um tilbúgvingina, og allir flokkar mæla til eina føroyska loysn, men eru ikki á einum máli um, hvussu henda skal fremjast.

Um semja ikki finst í samgonguni um eina føroyska tilbúgvingarætlan, so kann Jørgen Niclasen dúva uppá Marinustøðina.

Hóast Marinustøðin við Hoyvíksvegin skjótt er søga, so kann hon skipa fyri tilbúgving í sambandi við oljuvinnuna eftir nøkrum vikum